Summar Festivalur ´04

# Fagervik fegnast um umstøðurnar



*– Mær dámar væl at spæla inni, men tá ið veðrið er so gott sum hetta, so er tað gott at sleppa at spæla úti, segði Hans Inge Fagervik, sum var hugtikin av útsýninum út eftir vágni og út á Kunoyarnes*

**– Tað verður gott at sleppa at spæla í hesum góða veðrinum við hesum høgu fjøllunum rundan um, segði Hans Inge Fagervik, tá ið hann var á festivaløkinum hjá Summar Festivalinum í sólskininum fríggjadagin**

Sólin skein bæði oman og niðan, tá ið Hans Inge Fagervik fríggjadagin var framvið á festivaløkinum hjá Summar Festivalinum.

Ætlanin var, at gospelkonsertin, har Hans Inge er eitt av nøvnunum, skuldi verða innandura í KÍ-høllini, men veðrið er so gott í Klaksvík í hesum døgum, at tað er ikki hugsandi at lokka fólk innandura, og tí verður gospelkonsertin hildin á Vágsbø sunnukvøldið kl. 20.30

– Hetta eru sera góðar umstøður at spæla í. Tey høgu fjøllini rundan um Klaksvík ramma býin inn, helt Hans Inge fyri.

Hann plagar eisini at spæla uttandura í Noregi, tá ið summartiltøk verða hildin, men fyri tað mestu eru hansara framførslur innandura.

– Mær dámar væl at spæla inni, men tá ið veðrið er so gott sum hetta, so er tað gott at sleppa at spæla úti, segði Hans Inge Fagervik.

## Litfagurt pisshús



*Byggifrøðingurin og búskaparfrøðingurin fingu skjótt sett rættan Summarfestivaldám á pisshúsið.*

Rullandi pisshúsið var ikki júst summarsligt at líta á, tað kom til Klaksvíkar fyrr í vikuni. Men við pensli og máling fingu góð fólk skjótt sett lítla húsið í rætta festivalhýrin. So um tú knappliga mást, er hjálpin sólgul og eldreyð og løtt at finna beint við festivaløkið …
*-ave-*

## Gospelkonsertin flutt uttandura - vegna veður

Sum nakað rættiliga óvanligt í Føroyum er eitt av tiltøkunum á Summar Festivalinum flutt uttandura, vegna veður. Tað snýr seg um stóru gospelkonsertina, sum eftir ætlan skuldi vera sunnukvøldið í KÍ-høllini. Í fleiri dagar hevur alt nú bent á, at avbera góða veðrið fer at halda sær restina av vikuni. Tí hildu fyrireikarnir, at tað var synd, at áhoyrarnir á gospelkonsertini ikki eisini skuldu hava møguleika at njóta tað góða veðrið og frálíku umstøðurnar niðri í Vágsbø. Teir hava tí tikið tað heldur óvanliga stigið at flyta konsertina, so at gospeltónleikurin nú verður at hoyra av høvuðspallinum í Vágsbø sunnukvøldið kl. 20.30 - í røttum festivalumhvørvi.
*-ave-*

## Ólavur Presley letur heilsa ...

... at hann vónar ikki, at nakar tók hann í álvara í greinini "Ólavur Presley og skitnu kloddafylini full speed á kassan", sum stóð í blaðnum í gjár.

## Ókeypis barnadansur

Trølla Pætur og Angela, Trølla Pætur og Omman, sum koma dettandi í fallskíggja niður úr tyrluni … Sigast má, at børnini hava ovmikið at gleða seg til á Summarfestivalinum. Og nú hevur festivalnevndin eisini gjørt av, at børnini skulu sleppa í ókeypis barnadans í Vágsbø seinnapartin sunnudagin, har ein rúgva av øðrum undirhaldi eisini verður fyri bæði stór og smá.
*-ave-*

## Onki keipláss eftir

Tað er ikki bara í landi, tað byrjar at gerast trongligt, nú festivalgestirnir leita sær til Klaksvíkar. Nógv hava sjálvsagt nýtt høvið og góða veðrið at fara á Summarfestival í báti og gista umborð, men av Norðoya Kunningarstovu frætta vit, at nú er onki keipláss eftir. Eisini seingjarplássini fækkast skjótt, og í gjár vóru bert heilt fá pláss eftir á Ból og Biti

Men hjá teimum, ið hava hug at pakka telti er eingin trupulleiki, tí Karl Heri Joensen og Jógvan Vágheyg hava verið so beinasamir at lata tjaldingargestirnar eisini sleppa inn á sínar traðir Úti í Grøv, meðan Summarfestivalurin er. Og har er ovmikið av plássi eftir enn.
*-ave-*

# Hotelkokkur matger á festivalinum

Jógvan Heinesen, sum eigur og rekur Hotel Norð á Viðareiði og ger matin, fer at hava ein avgerandi leiklut á Summarfestivalinum. Hotellið hevur ein bás á festivaløkinum, har kokkurin sjálvur fer at standa og passa grillina.

Fólk kunna so harvið keypa sær grillaðar búffar við tilhoyri og okkurt at drekka, meðan tey njóta allan tónleikin, sum verður á skránni í allan dag.

Hotel Norð spælir annars ein stóran leiklut á Summarfestivalinum. Bæði tey stóru útlendsku nøvnini á festivalinum, Ken Hensley og Boney M, gista á hotellinum hesar dagarnar.

Sunnudagin skipa tey fyri einum serligum sunnudagsdøgurða á hotellinum, har eisini Brandur Enni fer at framføra.

– Áhugin fyri sunnudagsdøgurðanum er stórur, men enn eru nøkur pláss kortini eftir, sigur Jógvan Heinesen.

- sae -



Vikuskifti
Nr. 153 • leygardagur • 14. august 2004 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

»Føroysku familjuni« tørvar kunstigan andadrátt Lesið síðu 4-5





*Hans Jacob Højgaard 1904-1992*

# Heimbygdin fagnar Hans J. Højgaard

**Heimbygdin Toftir fagnar mikla tónaskaldinum Hans Jacob Højgaard sála, nú 100 ár eru síðani hann varð borin í heim í bóndahúsinum Inni á Regni á Toftum. Tað verður gjørt við heiðurskonsert, framsýning, fyrilestri, serligum hugnakvøldi og endað verður við einum konserttiltaki við lokalum kreftum sjálvan føðingardagin 11. september, tá ein fløga eisini verður givin út.**

100 ÁRA MINNI

Longu nú sunnudagin 15. august kl. 16 verður ein konsert, sum Norðurlandahúsið skipar fyri, og tann konsertin er partur av Listastevnuni. Hon verður í Fríðrikskirkjuni á Toftum, og kórini sum fara at syngja eru Kirkjukórið í Fríðrikskirkjuni við Mikael Johan Heinesen sum leiðara og Havnarkórið við Ólavi Hátún sum leiðara.

Mikael Johan Heinesen sigur, at skráin fyri hesa konsertina er gjørd soleiðis, at hon vísir, hvussu fjølbroytt tónaskald Hans J. Højgaard er.

Leygarkvøldið 28. august kl. 20 verður hugnaløta á Svangaskarði, har tónaskaldið av Toftum verður lýst á ein lættari hátt. M. a. fara næstrafólk hjá Hans Jacobi og fólk, ið hava sungið hjá honum, at greiða frá og felagssangur verður eisini á skránni.

Leygarkvøldið 4. september kl. 20 fer Ólavur Hátún at halda fyrilestur í kjallaranum í Fríðrikskirkjuni um, hvussu stóran týdning løgini hjá Hans Jacob Højgaard hava havt fyri sanglívið í Føroyum. Eftir at Hans Jacob var fluttur til Havnar, bleiv Ólavur eitt skifti lærari á Toftum og hevði eisini kór í bygdini. Ólavur og Hans Jacob høvdu nógv samskifti, og Havnarkórið hjá Ólavi hevur øll árini dúgliga framført løg hjá Højgaard, bæði í Føroyum og ikki minst uttanlands.

Í tíðarskeiðnum áðrenn føðingardagin letur ein framsýning um Hans J. Højgaard upp í kjallaranum í Fríðrikskirkjuni. Framsýningin fer at lýsa lívsstarvið hjá tónaskaldinum og fer eisini at nema við hansara yrki sum lærari. Lýst verður nærri nær framsýningin letur upp.

Sjálvan føðingardagin hjá tónaskaldinum, sum er 11. september, verður sangløta í Fríðrikskirkjuni kl. 18. Við verða Kórið í Fríðrikskirkjuni, eitt veterankór, har øll, ið hava sungið í kórunum hjá Hans Jacobi á Toftum, hava høvi at verða við, og barnakór úr Tofta skúla.

Sama dag verður ein fløga givin út við løgum hjá Hans J. Højgaard. Talan er um eitt savn við upptøkum, har blandað kór, barnakór og gentukór á Toftum syngja. Tónaskaldið sjálvt stjórnar flestu sangunum á fløguni. Fleiri av upptøkunum hava ikki verið givnar út áður.

Tað er mentunarnevndin í Nes Kommunu, sum samskipar tiltøkini í sambandi við 100 ára haldið. Formaðurin í mentunarnevndini, Símin Johannesen sigur, at øll eru vit greið yvir, at Hans J. Højgaard hevur lagt ein stóran serføroyskan sangskatt eftir seg. Bygdarráðið var ongantíð í iva um, at tað var rætt at heimbygdin ger nakað serligt burtur úr, nú 100 ár eru síðani tónaskaldið varð borið í heim. Símin vónar, at fólk taka væl undir við tiltøkunum sum eru á skránni.



*»Her ses det færøske Sankor Havner Sangfelag, der for Tiden besøger Grænselandet. Koret gav í Gaar Koncert i Aabenraa. I Dag er man i Løgumkloster, i Morgen i Sønderborg, og Fredag kommer Føringerne til sydslesvig. Efter rundtur i Landsdelen gives der Koncert paa Hotel Norden i Flensborg. Som det ses, er Sangerne iklædt smukke færøske Nationaldragter«, skrivaði Flensborg Avis*